Álit

í

løgtingsmáli nr. 140/2020: Uppskot til løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 fyri tíðarskeiðið frá og við 1. september 2020 til og við 30. apríl 2021

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 13. apríl 2021, og eftir 1. viðgerð tann 16. apríl 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 22., 23. og 26. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri smærri vinnurekandi, Ferðavinnufelagið, 62N, Smyril Line, Hotel Hafnia, GreenGate Incoming og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen.

Hjálparpakki 4 er í stóran mun ein leinging av hjálparpakka 3, tó við ávísum tillagingum. Í høvuðsheitum verður latin stuðul til fastar útreiðslur, harav løn við hámarki til lyklastarvsfólk. Hálparpakkin gevur sostatt, eins og teir undanfarnu, ikki endurgjald fyri mista inntøku, men stór niðurgongd í inntøkuni er ein fyritreyt fyri at fáa hjálp úr pakkanum.

Vónin var, at tað fór at bera til at lata uppaftur fyri ferðafólki til Føroya í vár og summar. Í skrivandi stund er tó sera ivasamt, nær støðan aftur verður normal, og landið er enn bert partvíst latið uppaftur, og ikki er vist enn, nær verður latið uppaftur so frítt verður at ferðast aftur.

Sambært uppkotinum er stuðulstíðarskeiðið frá 1. september og fram til 30. apríl. Hetta varð ásett ímeðan væntað var, at landið um stutta tíð fór at lata upp. Nú henda forsøgn er broytt, skjýtur nevndin tí upp at leingja stuðulstíðarskeiðið til 31. mai 2021. Tilvísingartíðarskeiðið verður broytt samsvarandi. Hetta fer sambært metingum frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum væntandi at kosta 2,1 milliónir kr. eyka. Harumframt verða gjørdar broytingar soleiðis, at skiljast kann ímillum matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi, eisini fyri matstovur á somu adressu sum gistingarhúsið.

Kostnaðarmetingarnar hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum eru í uppskotinum, at hjálparpakki 4 fer at kosta ímillum 27,5 mió. kr. og 47,5 mió. kr. Við broytingunum væntast, at kostnaðurin verður millum 29,6 og 49,6 mió. krónur. Hetta markið hækkar sostatt við 2,1 mió. kr.

Hesi hjálparpakkin loftar nógvum ferðavinnufyritøkum, sum hava verið fyri stórari niðurgongd í inntøkunum, sammett við tilsvarandi tíðarskeið frá á heysti 2018 til á vári 2019. Hóast uppskotið sum útgangsstøði fevnir um flestu ferðavinnufyritøkur, so eru tað fyrst og fremst tær, ið hava høgar rakstrarútreiðslur, ið fáa gagn av hesum hjálparpakka.

Vinnunevndin heitir á landsstýrið um nú at meta um tørvin hjá smærru ferðavinnufyritøkunum, og eisini smærru vinnufyritøkunum sum heild, sum hava verið fyri stórari afturgongd orsakað av koronu. Smærri vinnufyritøkur hava oftast lutfalsliga lágar fastar útreiðslur, og gjalda ofta sær sjálvum lítla løn, tá á stendur fíggjarliga. Hesar fyritøkur hava ikki sterk talsfeløg, sum alment tala teirra søk, og fleiri teirra hava verið noydd at taka upp stór lán fyri at kunna yvirliva. Hesar vórðu

fevndar av hjálparpakka 1 og lutvíst hjálparpakka 2, men ikki av hjálparpakka 3 og 4 sum landsstýrið hevur sniðgivið serstakt til tað, ein kann kalla kjarnufyritøkur í ferðavinnuni.

Nevndin saknar, at landsstýrismaðurin hetta árið við koronu leypandi hevði lagt fram greiningar av støðuni í ymisku vinnugreinunum. Nú hesin hjálparpakkin kom, varð hann gjørdur uttan samráðingar við flokkarnar á tingi. Tí mælir nevndin til, at ein eftirmeting nú verður gjørd av hjálparpakkunum, og um tað vísir seg, at onkur er dottin niðurímillum, eiga ábøtur at verða gjørdar tí viðvíkjandi.

Undir viðgerðini er Vinnunevndin vorðin kunnað um serstøku støðuna hjá Ørkini, hotellinum sum føroyskt stovnaður hjálpargrunnur rekur í Reykjavík. Tey detta sum skilst niðurímillum hjálparpakkarnar bæði í Føroyum og í Íslandi. Landið gav í sínari tíð ískoyti til bygging av hesum hotelli, sum fyrr virkaði sum sjómansheim og sum lutvíst virkar sum sjúklingahotell.
Nevndin heitir á landsstýrið um at taka hesar spurningar upp og finna nøktandi loysn, so hetta fyri føroyingar so týdningarmikla virksemi ikki dettur niðurfyri orsakað av koronu.

Somuleiðis vil nevndin vísa á serstøku avbjóðingina hjá áhugafeløgum, grunnum ella líknandi, sum reka føroysk seglskip, og hvørs summarinntøka ofta er grundarlagið undir inntøkunum, ið nýttar verða til varðveiting og rakstur av skipunum. Nevndin mælir til, at hesi verða fevnd av hjálparskipanum, sum gjørdar eru fyri mentanarligt- og almannagagnligt endamál.

Nevndin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Heitið á løgtingslógaruppskotinum verður orðað soleiðis:

“Uppskot til

Løgtingslóg

um
stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 fyri tíðarskeiðið frá og við 1. september 2020 til og við 31. mai 2021”

2. Í § 2, stk. 2 verður “30. apríl 2021” broytt til: “31. mai 2021”.

3. Í § 2, stk. 3, nr. 1 verður “30. apríl 2019” broytt til: “31. mai 2019”.

4. § 5, stk. 2, verður orðað soleiðis:
”*Stk. 2.* Hevur ferðavinnufyritøka ella samtak virksemi á tveimum ella fleiri virkisøkjum, nevnd í § 1, stk. 2, nr. 1-5, kann umsetningur og fastar útreiðslur verða gjørd upp fyri hvørt virkisøki sær.”

4. § 5, stk. 3, 1. pkt. verður orðað soleiðis:

"Fyri eina ferðavinnufyritøku, sum rekur tvey ella fleiri gistingarhús á tveimum ella fleiri adressum, kann umsetningur og fastar útreiðslur fyri tað ella tey gistingarhúsini, sum eru nýggj og ikki hava tilvísingarskeið, sum eru nevnd í § 2, stk. 3, nr. 1 ella nr. 2, verða gjørd upp fyri seg."

5. § 5, stk. 4, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Hevur fyritøka, sum rekur gistingarhúsvirksemi, útbygt gistingarhúsið og økt munandi um gistingarmøguleikarnar, kann umsetningur og fastar útreiðslur fyri nýggja partin av gistingarhúsinum, sum ikki hevur verið tikin í nýtslu í einum tilvísingarskeiði, sum eru nevnd í § 2, stk. 3, nr. 1 ella nr. 2, verða gjørd upp fyri seg."

Viðmerkingar:

Til nr. 1
Skotið verður upp, at stuðulstíðarskeiðið verður frá og við 1. september 2020 til og við 31. mai 2021.

Til nr. 2
Víst verður til viðmerkingarnar til nr. 1.

Til nr. 3
Víst verður til viðmerkingarnar til nr. 1.

Til nr. 4
Eftir hesi áseting í uppskotinum kann ein ferðavinnufyritøka, sum rekur virksemi, sum er nevnt í § 1, stk. 2, nr. 1-5 (gistingarhús, matstovur, ferðaskrivstovur, fyriskipaðar túrar og flutning av ferðafólki) velja annaðhvørt at gera umsetning og fastar útreiðslur upp fyri hvørt virkisøki sær ella at gera eina uppgerð fyri fleiri ella samlaða virkisøkið.
Rekur ein fyritøka t.d. bæði matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi, kann fyritøkan velja annaðhvørt at gera umsetning og fastar útreiðslur upp fyri hvørt virkisøki sær, ella at gera eina samlaða uppgerð fyri bæði virkisøkini. Hetta er eisini galdandi, um talan er um t.d. gistingarhús og matstovu á somu adressu. Við hesi broyting verður størri atlit tikið til, at ein samlað uppgerð ella ein uppgerð fyri hvørt virkisøkið sær, hevur ymiska ávirkan á úrslitið av uppgerðini í hvørjum føri sær.

Til nr. 5 og 6
Skotið verður upp, at fyritøkurnar skulu hava sama valmøguleika viðvíkjandi uppgerð av umsetningi og føstum útreiðslum, tá talan er um, at nýtt gistingarhús verður bygt, ella at verandi gistingarhús verður munandi útbygt.

Ein samd nevnd tekur við hesum broytingum og viðmerkingum undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 27. apríl 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	